# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# MUGU TORA AT TAKA AVGERÐIR

Tað er einki minni enn eitt fólkakrav, at okkara fólkavaldu politikarar á tingi nú fáa enda á áralanga kommunustríðnum. Løgtingið má taka støðu til, hvussu nógvar kommunur skulu vera í hesum landinum.

Vit plaga at siga, at Føroyar eru ikki meira enn ein hampulig gøta í Keypmannahavn. Tann myndin er slitin og yvirdrivin. Men bera vit kortini saman føroysk viðurskifti við donsk, so skuldu vit bara havt eina kommunu í Føroyum. Tað hevði kanska verið ríkiligt, men valla er tað hugsandi.

Um vikuskiftið frættist, at semja nú er um at skipa landið í níggju kommunur. Men tíðindini vóru ikki gomul á Portalinum, fyrr enn Fólkaflokkurin kom við sínum kravi um fólkaatkvøðu.

Hjá onkrum hevur tað verið ein treyt, at um eldraøkið skal flytast út til kommunurnar at umsita, so skal talan vera um fáar og sterkar kommunueindir. Og tað er eitt skilligt krav. Eyðsæð er, at um allar kommunur skulu hava fólkaatkvøðu um málið, so endar alt í hurlivasa. Tí vilja nakrar fáar smáar kommunur ikki spæla við, so er spælið spilt, og er tað rímuligt, at nøkur fá fólk í smáum kommunum skulu sleppa at gera av eina slíka kommunuumskipan?

Tórshavnar Kommuna hevur seinastu árini – og eftir at farið varð at tosa um kommunureform miðskeiðis í nítiárunum – lagt saman við fimm smærri kommunum. Tað er alt gjørt uttan fólkaatkvøðu í Tórshavnar kommunu, og tað er valla nakar, sum hevur ilt av tí.

Men vit kunnu taka undir við Hans Paula Strøm, tá hann á Portalinum segði, at skulu kommunurnar leggjast saman og fáa fleiri málsøki at umsita, so skal tað gerast ordiligt, tí annars skal tað als ikki gerast. Og tað sigur seg sjálvt, at kommunueindirnar skulu vera stórar. Tær verða ikki eins stórar og Tórshavnar kommuna, men helst átti eingin at verið minni enn eitt nú Klaksvíkar ella Runavíkar kommuna.

Tað er eisini rætt, at vit mugu hava onkran form fyri útjavning, um fíggjarliga tung øki verða løgd út til kommunurnar.




Her eigur at verða hugt eftir skattaskipanini, sum ikki er eins rættvís fyri kommunuskattin, sum landsskattin. Meðan øll gjalda tað sama í kommunuskatti, so fær landið meira í skatti frá teimum, sum vinna mest. Tann ágóðan áttu kommunurnar á ein ella annan hátt at fingið ágóðan av eisini.

Vit kunnu so bara vóna, at samgongan - og andstøðan - nú fáa tikið seg saman og víst, at tey kunnu taka avgerðir. Og tað skal vera ein avgerð, sum ikki verður tveitt út til borgararnar at taka fyri tingfólk, sum ikki tora sjálvi.

Hetta er tann einfalda skyldan, sum løgtingsfólk hava: At taka stórar avgerðir!

**Ein kommuna í Føroyum hevði verið nóg mikið**

## Tjaldrið sigldi bara 19 dagar

Seinastu tríggjar mánaðirnar í fjør var vaktarskipið, Tjaldrið var Tjaldrið bara í sjónum í 19 dagar til fiskiveiðieftirlit undir Føroyum.

Tað sigur Jacob Vestergaard, landsstýrismaður.

Hann sigur eisini, at í sama tíðarskeiði loysti Brimil bara fimm ferður frá bryggju í sambandi við sleip og annað líknandi og hann var sostatt ongantíð á eftirlitsferð undir Føroyum.

Kári P. Højgaard, tingmaður hevur fregnast eftir um okkara fiskiveiðieftirlit er á nøktandi støði.

Sjálvt um annað skipið liggur við bryggju, er tað altíð tókt, skuldi brúk verðið fyri tí til leiting og bjarging.

Nógvir tinglimir halda, at hetta er langt undir alt lágmark og teir undraðust á,



at ætlanin er at byggja nýtt havrannsóknarskip, tá ið vit ikki hava ráð at hava vaktarskipini siglandi.

- Upplýsingarnir frá landsstýrismanninum avdúka, at vit hava rætt og slætt onki eftirlit úti á grunnunum, sigur Kári P. Højgaard.

Heini O. Heinesen spurdi um vit vóru aftur í somu støðu í dag, sum í kreppuni í nítiárunum, tá ið veiðitjóvar ikki máttu takast, tí tað var synd.

Sjálvur heldur landsstýrismaðurin, at vit hava tað eftirlit, Løgtingið er sinnað at gjalda fyri.

Men annars er eftirlit á landið, har avreiðingar verða kannaðar og somuleiðis verður fylgt við skipum umvegis fylgisvein.

Hann helt, at situr Heini O. Heinesen við upplýsingum um, at okkurt er, sum ikki tolir dagsins ljós, skal hann koma fram við teimum ístaðin fyri at illgita, tí so verða tiltøk sett í verk.

Hann viðgongur, at eftirlitið er avmarkað, tí játtanin røkkur ikki til, men hann heldur, at tað kortini er forsvarligt.

- Hinvegin er bjargingartænastan nøktandi, tí skipini eru altíð tøk til leiting og bjarging.

## Floksfelagar í hornatøkum

»Tá krakkaveldið verður tikið fram um borgaran«. Soleiðis skrivaði Thomas Arabo, fyrrverandi strandferðslustjóri og løgtings- og landsstýrismaður fyri Javnaðarflokkin í eini sera atfinningarsamari grein um Fíggjarmálaráðið.

Hesa grein hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jóannes Eidesgaard, tikið at sær, og tí fær Thomas Arabo nú eina breiðsíðu frá floksfelagnum. Orrustan byrjaði við rustaða botninum á Rituni, men endar við umsiting av ALS og Samhaldsfasta.

Í kommunumálunum síggja vit eisini fólkafloksfelagar í líknandi stríði.

Kanska eru floksmørkini farin at kámast, ella man tað vera nýggi trendurin, at floksfelagar skulu vera ósamdir fyri at tekkjast veljarunum?



**Skotriður móti Klaksvík**

JÓGVAN VIÐ KELDU
KJAK Á SÍÐU 30



**Hvørji verð liva tit í?**

JOHAN SAMUELSEN
KJAK Á SÍÐU 28

## Havnar- ella Landssjúkrahúsið



Óli Mikkelsen, lækni, er farin at troyttast av lokalpatriotum í Klaksvík, sum tosa um »hospitalið í Havn«. Í grein í blaðnum í dag vísir hann á søguna hjá ymsu »hospitalunum« í Havn, og at ikki fyrr enn Landssjúkrahúsið varð bygt liðugt, varð farið at tosa um serdeildir, sum skuldu vera á meginsjúkrahúsinum, sum Landssjúkrahúsið var vorðið. Tí var navnið broytt frá Dr. Alexandrines Hospital til »Landssjúkrahúsið«.

Óli Mikkelsen sigur soleiðis:

*Ein ógvuslig hóttan er, at vit eru við at missa støði sum partur av útbúgving av læknum.*

*Fylgja vit ætlanini hjá heilsumálaráðharranum at spjaða serdeildirnar, fær sjúkrahúsverkið og harvið alt heilsuverkið afturstig.*

*Nú skulu vit hava trý sjúkrahús á trimum matrikulum. Hví skal hetta setast so hvast upp nú?*

*Vit eiga at fáa at vita, hvat liggur aftanfyri.*

Greinin kann lesast á síðu 30



**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*